

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 03 - 2013

# Statoil útsetir Alaska

Statoil hevur gjørt av at útseta sínar ætlanir í Alaska. Tað kunngjørdi stjórin fyri norðuramerikonsku deildini hjá Statoil, Bill Maloney, í samrøðu við Bloomberg-tíðindastovuna í dag. -Vit steðga á í Alaska. Tað verður ikki aktuelt við olju haðani fyrr enn í 2020, og tí er olja haðani ikki við í okkara framleiðslumetingum, segði Bill Maloney við Bloomberg. Statoil hevur fyrr kunngjørt, at mál felagsins er at framleiða 2,5 milliónir tunnur um dagin í 2020 ella eina hálva millión meiri enn í dag. Felagið hevur eisini sagt, at tað væntaði at fáa 500.000 tunnur frá framleiðsluni í Norðuramerika um dagin. Nú sigur Bill Maloney, at eingin olja fer at koma úr Alaska hesi árini. Sum Shell Avgerðin hjá Statoil at steðga á í Alaska er ein beinleiðis avleiðing av, at Shell hevur slept sínum ætlanum um at bora í Chukchi og Beaufort-Havinum úti fyri Alaska-strondini. Felagið tók avgerðina í síðstu viku eftir fleiri óhapp tað seinasta árið. -Eg haldi, at tað kann vera skilagott at læra av hvør øðrum, sigur leitistjórin hjá Statoil, Tim Dodson, við Bloomberg. -Tað er betri at lata tíðina arbeiða fyri teg heldur enn ímóti tær, legði hann afturat. Fleiri loyvi Í 2008 keypti Statoil seg inn í 16 leitiloyvir í Chukchi-havinum úti fyri Alaska. Í 14 av loyvunum arbeiðir felagið saman við italska Eni, og norska felagið er operatørur í øllum. Ætlanin hjá feløgunum var at seta borin í undirgrundina í 2014 við tveimum verkætlanum, sum hava fingið nøvnini Amundsen og Augustine. Statoil eigur herumframt 40 prosent av einum loyvi, sum felagið hevur saman við Chevron í Beaufort-havinum úti fyri kanadisku strondini.